## Banna bilvaski

Áhaldandi turkur í Bergen hevur nú noytt kommununa har at geva bensinstøðum, verkstaðum og øðrum forboð fyri at lata fólk vaska sínar bilar í bilvaskimaskinunum. Kommunan sigur, at bilvaskimaskinurnar í býnum brúka umleið 500.000 litrar av vatni um samdøgrið. Kommunan hevur eisini gjørt av at banna fólki at brúka vatn frá teirri kommunalu vatnveitingini til at vaska bil við hús ella at spula túnið ella gongubreytina uttanfyri.



## Meirilutin fall í Letlandi

Stjórnin í Letlandi misti sín meiriluta í tjóðartinginum í gjár, tá tann størsti flokkurin, Fólkaflokkurin, tók seg burtur úr samgonguni. Orsøkin til slitið var, at flokkurin kundi ikki taka undir við teimum tiltøkunum, sum stjórnin ætlar at fremja fyri at skerja skuldina hjá tí almenna og bøta um búskaparstøðuna sum heild. Eftir hetta hevur stjórnin bara 47 av teimum 100 tinglimunum aftan fyri seg, og eygleiðarar halda ikki, at hon kann fáa meiriluta fyri teimum ætlaðu uppskotunum, sum skulu sáa búskapin aftur á beint.

# tríggjar reiggjur



Hoyvík, er greið yvir trupulleikarnar og hevur fingið ávísar klagur frá foreldrunum, men sambært henni eru batar í væntu.

– Tað hevur verið gongd í málinum, og vit hava fingið at vita, at nógv verður gjørt í vár, sigur leiðarin á dagstovninum í Hoyvík.

Men hon viðgongur eisini, at seinastu árini er ikki nógv gjørt við garðin hjá stovninum, uttan at tað beinleiðis hevur hótt trygdina hjá børnunum.

– Vit hava tikið skreiðibreytirnar burtur fyri einum tveimum árum síðan, tí tær ikki vóru nóg tryggar. Og eg havi skilt, at nýggjar eru ávegis nóg, greiðir leiðarin frá.

Hon sigur somuleiðis, at hon er sannførd um, at kommunan lurtar. – Tað gongur bara ikki altíð líka skjótt, sigur Anna Maria Antoniussen.

Leiðarin viðgongur eisini, at stórur trupulleikar kunnu verða við hurðunum, sum binda tá tað er vátt.

– Húsavørðurin hevur gjørt ymiskt við hurðarnar við millum annað at skera av teimum, umframt at lítil hálvtak eru gjørdar uppi yvir hurðunum, men nú ber ikki til at gera meira, tí annars gloppa tær um summarið, men eg havi eisini fingið at vita frá kommununi, at tað verður gjørt í ár, sigur Anna Maria Antoniussen.

Hon leggur afturat, at tey hava fleiri reiggjur liggjandi, men at tað bara manglar at seta tær upp.

### Karmarnir skuldina

Í nøgdsemiskanningini, sum Tórshavnar kommuna gjørdi, vísti tað seg, at dagstovnurin í Hoyvík endaði um miðjuna, og sambært leiðaranum er tað bert kringumstøðurnar, sum hava skuldina av, at stovnurin ikki endaði millum teir allar bestu.

– Vit hava nógvar pedagogar á stovninum, sum veruliga gera sítt arbeiði, men tá teir, sum gjørdu kanningina vóru her, greiddu teir frá, at tað mestsum bara vóru kringumstøður so sum hurðar, portur og spælipláss, sum taldu niður, sigur leiðarin á stovninum.

Og hetta er júst tað sama, sum foreldrini siga.



*Hurðarnar á dagstovninum í Hoyvík binda so illa, tá tað er vátt í veðrinum, at verða hurðarnar lætnar aftur, so megna børnini ikki at fáa tær upp. Tí standa tær allan dagin og gloppa*



*Har, sum mold er á myndini, var einaferð ein skreiðibreyt, men hon var mett at vera ov ótrygg, og tí var hon tikin burtur fyri tveimum árum síðan. Onki er komið í staðin, og trappan niðan har, sum breytin var, er full í holum. Foreldur hava víst á trupulleikarnar, men enn er onki hent*

## Vit hava eina ætlan

**Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu, vil ikki ordiliga ganga við til, at garðurin ikki er nøktandi, men vísir tó á, at ein ætlan er í gongd. – Eg kann sjálvandi ikki siga, nær tað verður heilt liðugt, sigur borgarstjórin, sum hevur lovað at í heyst verður alt í lagi á øðrum stovni**

DAGSTOVNUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Vit hava eina ætlan fyri spæliplássini á øllum dagstovnunum, og teir sum eru ringast fyri vera tiknir fyrst. Um Dagstovnurin í Hoyvík er ein av teimum, so verður hann sjálvandi tikin við, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn.

Hann vil tó ikki siga, nær nakað endaligt verður klárt.

– Vit hava sjálvandi ikki kunnað gjørt nakað seinastu mánaðirnar fyri kava, sigur Heðin Mortensen og vísir enn eina ferð á, at ætlanir eru í gongd.

– Tað verður sjálvandi ein prioritering, og hinir stovnarnir skulu eisini hava sítt, sigur borgarstjórin.

Hann vísir somuleiðis á, at heildarætlanin, sum er í gongd eisini skal betra um trygdina.

– Eg veit at ávís ting eru gjørd á hasum stovninum fyri at betra um trygdina, sigur hann.

*Men nú er ikki so nógv eftir. Har standa tríggjar reiggjur til 88 børn.*

– Men reiggjur eru ikki alt. Har er eitt gott umhvørvi, ein fótbóltsvøllur er beint við í skúlagarðinum, tað ber til at fara útferðir og tað er at vera kreativur, sigur Heðin Mortensen, og vísir á, at kommunan ikki hevur brúkt smávegis av peningi til dagstovnin í Hoyvík.